# Hugnalig upphiting til Summarfestivalin

**Hóskvøldið vóru fyrstu tiltøkini á Summarfestivalinum, og fólk veruliga hugnaðu sær í tí góða veðrinum. Á skránni var barnaundirhald, karaoke og annað**

SUMMARFESTIVALURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Hestarnir vóru millum best umtóktu upplivingarnar í Silvalandi*

*mynd: Bárður og Anton*

Hóskvøldið gav fólki ein lítlan forsmakk uppá Summar Festivalin, sum av álvara byrjar kl. 18.00 fríggjakvøldið. Fleiri ókeypis tiltøk vóru á skránni hóskvøldið, og tey riggaðu avbera væl.



*Nógv ung fólk royndi seg á karaoke pallinum á Torginum*

*mynd: nud*

Barnaundirhald var við Angelu & Hannibal, og tað vóru sera nógv børn og hugdu at. Eisini var sungið karaoke, og har stóðu fólk í langari bíðirøð fyri at sleppa framat. Virkishúsið leggur javnan pall til karaoke og tað var lætt at síggja, at hesi ungu vóru von við at syngja karaoke.

Í Virkishúsinum spældu The Story Ends, Isadora and The Rebels og Budam og allar tríggjar konsertir vóru sera væl vitjaðar. Silvaland hevði opið hóskvøldið, og børnini stuttleikaðu sær óført, bíðirøðin til at ríða á hesti var long, og tey trý fryntligu rossini bóru nógv hundrað børn eftir Vágsbø. Ein pápi, ið vit fingu orðið á helt, at tað var heilt fantastiskt, at tey høvdu gjørt alt hetta fyri børnini. Hoppiborgirnar og klintriborgin vóru væl vitjaðar og einstøk børn sótu í stóra sandkassanum og hugnaði sær.

Kl. 19.00 fríggjakvøldið verður fyrsta konsertin á Summarfestivalinum, tá Sarah Brendel fer at spæla á Vágsbøi.

# Myrkar søgur um lívsgleði

**Búi Dam lat í ein tíma sín innara søguforteljara fáa fríar ræsur og úrslitið var ein bergtakandi uppliving**

SUMMARFESTIVALURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Meðan Budam í yvir ein tíma bergtók áhoyrararnir, fyltist Virkishúsið alsamt. Á sín heilt egna hátt vísti fyrrverandi Ivory, 200 og Deepend gittarleikarin Búi Dam sín innara søguforteljara - Hesin er inniligur og ógvisligur og tykist at hava bíða í alt ov nógv ár eftir at sleppa út.

Søgurnar eru mest um lívsgleði, m.a. mista lívsgleði og vaknandi lívsgleði, tó eru tær í stóran mun bæði myrkar, daprar og ógvisligar, og mest av øllum ikki fittar.

Bólkurin taldi Magnus Johannesen á tangentum, Rógva á Rógvu á slagverki og tí sera sensuellu Ásu Wraae Olsen á rødd og sjálvan høvuðsmannin Búa Dam á gittara og rødd. Tey spældu eina konsert, ið tyktist nakað so øgiliga viðkomandi. Her vóru søgur um krabbamein, einsemi, deyða, missin av børnum, kynsliga samveru, um kvinnuliga kynið og mangt annað. Vit lurtaðu, klappaðu, trampaðu og livdu við, og øll vóru bergtikin.

Budam minnir í løtum um Nick Cave í inniligheit og um Runa T. Kidde í formi. Tú mátti lurta, hetta er ikki tónleikur, ið kann lirast av. Hetta skal spælast inniligt, og tað gjørdi Budam. Serliga stuttligt var at síggja hvussu teir báðir gomlu garparnir Magnus og Rógvi hugnaðu sær, tyktist sum um teir í hesi verkætlan veruliga hava funnið spæligleðina aftur.

Ása Wraae Olsen er í mínari verð eitt óskrivað blað, men tað kemst ikki uttanum, at hon í leiklutinum, sum eitt slag av fúlari álvagentu, gav Budam eitt lyft, og undirstrikaði inniligheitina í úttrykkinum.

Virkishúsið riggaði ófatiliga væl sum karmur um hesa framførslu, ið endaði eitt heldur blandað tónleikakvøld í Klaksvík.



*Búi Dam fortelur søgur, ið tú noyðist at lurta eftir*

*mynd: nud*





*Áskoðarar lurtaðu bergtiknir eftir søgunum hjá Búa*

*myndir: nud*